LØGMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF JUSTICE

Skálavíkar kommuna

Tórshavn, tann: 12. desember 2024
J. nr.: 24/23512-11
Viðgjørt: CHD

Viðvíkjandi kommunustýrisfundi 7. oktobur 2024
Kommunustýrislimur í Skálavíkar kommunu sendi tann 7. oktobur 2024 klagu til Kommunala eftirlitið, ið snúði seg um, at kommunustýrisfundurin 7. oktobur 2024 ikki var lýstur alment, hvørki á svørtu talvu, bløðunum ella facebook.

Niðurstøða
Fundurin tann 7. oktobur 2024 er ikki hildin í samsvari við kommunustýrislógina § 13, stk. 1 og § 26, stk. 1 og er tí ikki hildin á lógligan hátt. Fundurin er *ikki* viðtøkuførur.

Lógargrundarlag

- Løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýrið (Kommunustýrislógin)

Málsgongd
Eftir at Kommunala eftirlitið fekk klaguna frá kommunustýrisliminum í Skálavíkar kommunu sendi eftirlitið, tann 9. oktobur 2024 teldupost til Skálavíkar kommunu, og bað kommununa um at greiða frá málinum, m.a. um fundurin varð lýstur alment. Eisini varð biðið um avrit av skrá og gerðabók fyri kommunustýrisfundin 7. oktobur 2024, umframt avrit av kommunustýrisskipan og fundarskipan fyri Skálavíkar kommunu.

Tann 23. oktobur 2024 sendi Skálavíkar kommuna avrit av telduposti við skrá, ið sá soleiðis út:

> ”Emne: VS: Bygdarráðsfundur mánadagin 07-10-2024 kl 1700 á skrivstovuni
>
> …
>
> Skrá fyri fundi:
>
> 1. Fíggjarætlanin fyri 2025, enn eru ongi nýggj tøl komin, men skattaprocent og barnafrádráttur skulu ásetast.
> 2. Tilboð um asfaltering, sí mál til fundin.
> 3. Ognartøka burtur av matr. 162?
> 4. Umsókn um stuðul.”

Í hesum teldupostinum varð eisini biðið um longda freist at svara Kommunala eftirlitinum. Kommunala eftirlitið longdi freistina at svara til tann 1. novembur 2024.

Tann 1. novembur 2024 sendi Skálavíkar kommuna Kommunala eftirlitinum avrit av Kommunustýrisskipan og fundarskipan fyri Skálavíkar kommunu og soljóðandi frágreiðing um málið:

> "...
>
> Fyrst er at siga, at onki illgrunasamt var ella er við fundinum. Fundarboð við tilfari var sent út á vanligan hátt til allar bygdarráðslimir tann 3. oktober. Hvørki undan ella tá fundurin var settur tann 7. oktober var tað nakar, sum mótmælti ella ikki tók undir við, at fundurin var lógliga innkallaður, viðtøkuførur og kundi haldast.
>
> Eitt endamál við fundinum var, nú eg skuldi avstað til skips, at kunna limirnar, um hvat rørir seg í kommununi. Øllum kunnugt, so er Skálavík ein lítil kommuna, umleið 140 fólk, so nevndir eru ikki í kommununi. Hesar uppgávur liggur í flestum førðum hjá borgarstjóranum.
>
> Almannakunngjørt bleiv ikki frammanundan, at fundur skuldi verða, og hongur hetta saman við, at ætlandi skuldi ongin endalig avgerð takast, men viðurskifti vóru at umrøða og samansjóða, og at talan var ikki um fund, har mál skuldu viðgerast á almennum fundi. Hetta átti møguliga at verði almannakunngjørt frammanundan kortini, men so var ikki í hesum føri.
>
> Rúgvusmikið tilfar var sent út til limirnar, hetta fyri at gera tey betur kunnaði til viðgerðirnar, men lýst varð ikki við almennum bygdarráðsfundi, tí ætlandi varð ongin endalig ongin viðgerð, men var ætlanin meira at tosa saman.
>
> Fyrsta málið var fíggjarætlanin 2025. Har høvdu vit havt 1. viðgerð. Nýggj tøl koma ofta leypandi, so eg kunnaði um, at ikki var vist at nýggj tøl vóru komin til fundin. So var, men vit høvdu eitt gott prát um mettu útreiðslurnar 2025, og semja var um skattaprocent og barnafrádrátt.
>
> Her er tað tó soleiðis, at fíggjarætlanin 2025 kemur fyri aftur til 2. viðgerð á almennum bygdarrásfundi seinni í ár.
>
> Annað mál at umrøða var asfalteringin. Her var talan um brádliga íkomann møguleika at fáa eitt kommunalt asfaltarbeiði á kommunalum vegi gjørt, nú privatur aktørur skuldi hava sítt asfaltarbeiði kring ein íbúðarblokk gjørt, og í tí sambandinum var viðkomandi at frætta bygdarráðsins støðu, innan afturboðast kundi til veitaran, um kommunan var áhuga. Talan var um umrøðu av sáttmálatreytum og tilboðum, sum vanliga verða viðgjørd fyri afturlatnum hurðum

> Eftir at bygdarráðið hevur givið sína støðu til kennar ber til at fara víðari við ætlanini, men málið kemur fyri til endaliga støðutakan á einum komandi bygdarráðsfundi seinni í ár.
>
> Triðja málið var málið um ætlaða ognartøku, men har var støðan hon, at tað vísti seg, at Hagastýrið eisini skuldi hava skrivið um ognartøku til ummmælis, og tí var málið ikki búgvið til støðutakan enn.
>
> Loksins var eitt smál umrøtt, sum var málið um stuðulin til bókaútgávu hjá A á 5.000,- kr. Talan var um smámál.
>
> Annars kann verða viðmerkt, at klagarin – hóast fundarboð við vanligari freist, ikki møtti og ikki gav avboð til fundin.
>
> Hjálagt er avrit av gerðabókini frá fundinum 7. oktober 2024. Somuleiðis er hjálagt avrit av kommunustýrisskipan og fundarskipan, sum biðið er um."

Tann 6. novembur 2024 sendi Kommunala eftirlitið eina váttan fyri móttøkuna, umframt at biðið varð um avrit av gerðabók fyri kommunustýrisfundin 7. oktobur 2024, tí hon ikki var móttikin.

Tann 6. novembur 2024 sendi Skálavíkar kommuna avrit av umbidnu gerðabók, umframt soljóðandi frágreiðing:

> "...
>
> Viðvíkjandi mál nr 4, undir viðgerð, valdi eg at orða meg soleiðis, "at ráðið var samt um mállýsingina", hetta tí at málið kemur fyri aftur á fyrst komandi almennum fundi, til endaliga avgerð.
>
> Málið um kirkjugarðin, er specielt, tað vísir seg at partar av kirkjugarðinum enn standa á festijørðini í Dalsgarði, hóast hann var gjørdur fyri 50 árum síðani. Tí verður upphæddin til keypið endaliga staðfest á komandi fundi og avgreitt.
>
> Var klagarin við á fundinum, kundi hann bæði luttikið í kunningini og viðgerðini.
>
> …"

Tann 5. desembur 2024 bað Kommunala eftirlitið Skálavíkar kommunu um at upplýsa nær og hvar vanligir kommunustýrisfundir verða hildnir, og um hetta er lýst á svørtu talvu og hvar á heimasíðuni hjá kommununi.

Tann 6. desembur 2024 sendi Skálavíkar kommuna Kommunala eftirlitinum avrit av gerðabók fyri kommunustýrisfundin tann 17. juni 2024, sum sambært málslýsingini av mál nr. 03 staðfestir nær

almennu fundirnir fyri setanina út, skulu verða, nevniliga tann 21. august, 18. september, 4. desembur og 30. desembur 2024, umframt soljóðandi frágreiðing:

> ”Seinastu hálvu øldina, hava allir fundir verið á sama stað, “kommunuskrivstovan í skúlanum” og í allar flestu førum kl.1900, lýstir í svørtutalvu. Hinvegin so er heimasíðan nýggj, so har er ikki høvuðskunningin.”

Viðmerkingar hjá Kommunala eftirlitinum
Skálavíkar kommuna skrivar í frágreiðingini til Kommunala eftirlitið, at kommunustýrisfundurin 7. oktobur 2024 ikki bleiv almannakunngjørdur, tí ætlandi skuldi ongin endalig avgerð takast, og at talan ikki var um ein fund, har mál skuldu viðgerast á almennum fundi.

Kommunustýrislógin § 13, stk. 1 ásetur:

> “Kommunustýrið hevur vanliga fund eina ferð um mánaðin. Nærri reglur um vanligar fundir skulu vera ásettar í fundarskipanini. Almannakunngjørt skal verða við ársbyrjan, nær og hvar vanligir kommunustýrisfundir verða hildnir.”

Í viðmerkingunum til greinina stendur:

> “Ásetingin um, at kommunustýrið vanliga hevur fund eina ferð um mánaðin er ein vegleiðandi regla. Hon er tí ikki til hindurs fyri, at fleiri fundir verða hildnir, ella, at eingir vanligir fundir t.d. verða hildnir í summarfrítíðini. Kommunustýrið ger sjálvt av, nær og hvar vanligir fundir verða hildnir. Kommunustýrið kann gera av, at halda fundir ávísar dagar í vikuni, dagstevndar dagar ella annað. Tá ið kommunustýrið árliga ásetir nær kommunustýrisfundir skulu verða, so eigur tað at verða gjørt við atliti, at møguleika borgaranna til hjáveru. Tað er tí hóskiligt, at halda kommunustýrisfundir uttan fyri vanliga arbeiðstíð. Tann samtykta fundarætlanin er bindandi, og skal hon sambært stk. 1, 2. pkt. verða almannakunngjørd. Sambært vanligum reglum, er tað eitt krav til fundarætlanina, at hon er so mikið greið, at borgararnir ikki aftan á almannakunngerðingina ivast í, nær kommunustýrisfundir verða hildnir. Henda ásetingin krevur sostatt, at bæði tann árliga fundarrøðin og tann einstaki fundurin skulu verða almannakunngjørd.”

Sostatt er tað eitt krav at allir kommunustýrisfundir verða almannakunngjørdir, t.e. bæði árliga fundarrøðin og einstakir kommunustýrisfundir.

Í ítøkiliga málinum er talan um ein einstakan kommunustýrisfund og ikki ein kommunustýrisfund, sum er ásettur sambært samtyktu fundarætlanini, sbr. upplýsingunum í málinum.

Vísandi til, at fundarboð við tilfari varð sent út á vanligan hátt til allar kommunustýrislimirnar við fýra ítøkiligum málum á fundarskránni, sum skuldu viðgerast á kommunustýrisfundinum, metir Kommunala eftirlitið, at talan var um ein vanligan kommunustýrisfund, sum átti at verið lýstur alment fyri borgarunum.

Sambært avriti av gerðabók fyri ítøkiliga kommunustýrisfundin stendur skrivað:

> "Fundurin var fyri afturlatnum hurðum."

Kommustýrislógin § 26, stk. 1 ásetur:

> "Kommunustýrisfundir eru almennir. Um neyðugt, kann kommunustýrið gera av, at mál, sum t.d. persónsmál, skulu verða viðgjørd fyri afturlatnum hurðum. Henda viðger kann fara fram fyri afturlatnum hurðum, um borgarstjórin ger tað av, ella um 1/3 av kommunustýrislimunum krevur tað."

Í viðmerkingunum til greinina stendur:

> "...
>
> Ásetingin í stk. 1, 2. pkt. um, at mál kunnu verða viðgjørd fyri afturlatnum hurðum, er eitt undantak til lógarásettu meginregluna um, at kommunustýrisfundir eru almennir.
>
> Tey mál, ið av góðum grundum kunnu verða viðgjørd fyri afturlatnum hurðum, eru tílík, har trúnaðarupplýsingar væntandi verða drignir fram undir málsviðgerðini. Men um trúnaðarlig upplýsing bert kann væntast at verða drigin fram í møguligum kjaki í einum máli, sum er á fundarskránni, skulu ongar áneyðir verið at havt fund fyri afturlatnum hurðum.
>
> ...
>
> Ásetingin forðar ikki fyri, at kommunustýrið kann seta í fundarskipanina nøkur sløg av málum, sum væntandi skulu verða viðgjørd fyri afturlatnum hurðum. Tó skal ein ítøkilig meting verða gjørd í hvørjum einstøkum føri.
>
> ..."

Sambært ítøkiligu gerðabókini verða fýra mál viðgjørd. Talan er ikki um somu mál, ið vóru á fundarskránni. Málið viðvíkjandi ognartøku verður ikki viðgjørt, hóast hetta varð sett á skrá. Greitt verður ikki frá, hví málið ikki verður viðgjørt, tó verður greitt frá hesum í viðmerkingunum til Kommunala eftirlitið.

Mál nr. 1 í gerðabókini snýr seg um fíggjarætlan 2025, og um at áseta skattaprosent og barnafrádrátt, mál nr. 2 snýr seg um at samtykkja eitt tilboð um asfaltering, mál nr. 3 snýr seg um eina umsókn um stuðul og mál nr. 4 snýr seg um at samtykkja eina eykajáttan 2024.

Vísandi til upplýsingarnar í málinum metir Kommunala eftirlitið, at hvørki mál nr. 1, 3 ella 4 eru mál, ið kunnu verða viðgjørd fyri afturlatnum hurðum, tí talan ikki er um tílík mál, ið innihalda trúnaðarupplýsingar.

Mál nr. 2 snýr seg um at taka av einum tilboði viðvíkjandi asfaltering av vegi.

Í fundarskipan fyri Skálavíkar kommunu er ásett í § 2, stk. 1, d), at kostnaðarætlanir og tilboð viðvíkjandi byggiarbeiðum og tilfarsveitingum, skulu verða viðgjørd fyri afturlatnum hurðum.

Sambært gerðabókini hevur kommunustýrið ikki gjørt nakra ítøkiliga meting av, hvørt talan í hesum føri varð um eitt mál, ið skuldi verða fyri afturlatnum hurðum.

Kommunala eftirlitið heldur, at tað er møguligt, at hetta málið kundi haldast fyri afturlatnum hurðum, men má kommunustýrið gera eina ítøkiliga meting av hesum.

Niðurstøða
Vísandi til gjøgnumgongdina omanfyri kann Kommunala eftirlitið staðfesta, at fundurin ikki er hildin í samsvari við kommunustýrislógina § 13, stk. 1 og § 26, stk. 1.

Fundurin tann 7. oktobur 2024 er sostatt ikki hildin á lógligan hátt og er tí ikki viðtøkuførur.

Kommunala eftirlitið skal biðja Skálavíkar kommunu um innan 2 mánaðir at upplýsa fyri sær, hvat niðurstøðan hjá Kommunala eftirlitinum gevur Skálavíkar kommunu høvi til.

Løgmálaráðið, 12. desembur 2024

Nella Festirstein (sign.)
Aðalstjóri